Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Fyriskipanir á hægri útbúgvingum til lesandi við serligum avbjóðingum

Spurningar:

1. Hvørji átøk eru sett í verk fyri at hjálpa og stuðla lesandi á hægri lestri, sum hava serligar avbjóðingar, eitt nú orðblindni, tunghoyrn, ADHD, autismu o.a.?
2. Hvørjar førleikar hava verandi lestrarvegleiðarar á hægri lestri at hjálpa og vegleiða lesandi við serligum avbjóðingum?
3. Er nøkur ætlan um útbúgva vegleiðarar at vegleiða og stuðla lesandi við serligum avbjóðingum á hægri lestri?
4. Er nøkur meting gjørd av, hvat tað hevði kostað landinum at sett í verk líknandi skipanir við SPS-vegleiðarum, eins og í Danmark?

Viðmerkingar:
Seinastu 10 árini er nógv hent á undirvísingarøkinum, tá tað kemur til hjálp til næmingar við serligum avbjóðingum. Millum annað er serlig útbúgving sett í verk til at útbúgva lærarar til serøkið, flokkar eru skipaðir til næmingar við serligum tørvi, umframt ymsar skipanir, sum hjálpa næmingum at fáa útvegað hjálpiamboð – hetta er galdandi bæði á miðnámi og í fólkaskúlanum. Eisini er ein arbeiðsbólkur settur, sum skal koma við tilmælum um, hvussu landið loftar næmingum við sálarligum avbjóðingum á miðnámi.

Kortini eru at kalla ongar skipanir til lesandi á hægri lestri, sum hava serligar avbjóðingar. Fróðskaparsetrið bjóðar lestrarvegleiðing, men sum heild eru tilboðini avmarkað. Í eitt nú Danmark hava universitetini serligar SPS-vegleiðarar (specialpædagogisk støtte), sum lesandi kunnu venda sær til, hava tey serligar avbjóðingar, ella ynskja at verða útgreinað fyri serligar avbjóðingar, ið ávirka teirra lestrartilgongd. Talan kann vera um eitt nú orðblindni, hoyritrupulleikar, ADHD, autismu o.s.fr.

Undirritaði ynskir tískil at fáa greiðu á, um arbeitt verður við nøkrum ítøkiligum ætlanum at lofta lesandi á hægri lestri, ið hava serligar avbjóðingar.

Á Løgtingi, 20. apríl 2021

Jóhannis Joensen